## DAGSINS MEINING

# Orðaskiftið til Føroya takk

Ein oddagrein okkara um viðgerðina av blokkinum á ráðstevnu á Christiansborg herfyri er fallin onkrum fyri bróstið. Vit hava á blaðnum einki ynski um at forða nøkrum bólki, flokki ella einstaklingum at upplýsa um blokkin ella at skipa fyri orðaskifti um blokkin. Hinvegin fara vit til einaoghvørja tíð at tilskila okkum rætt til at gera viðmerkingar til tað, sum fer fram í føroyska og danska samfelagnum. Av tí, sum fyrilá frá nevndu ráðstevnu, fingu vit ta fatan, at ein av boðskapunum frá ráðstevnuni var, at blokkurin einvíst er skaðiligur fyri føroyskan búskap, og at hetta nú var greitt fyri donskum politikarum. Tað næsta ein kundi væntað, var eitt danskt initiativ til at minka blokkin enn meira.

Við støði í hesum vístu vit á, at avgerðin um blokk ella ikki blokk eigur at liggja í Føroyum og onga aðrastaðir. Vit eru als ikki ósamd um, at blokkurin kann vera skaðiligur, um hann ikki verður nýttur rætt, men hetta var ikki evnið fyri okkara oddagrein. Tað, sum vit vildu siga, var, at vit halda tað vera skeivt, at føroyskur politikkur verður fluttur niður á Christiansborg. Hetta er skeivt uttan mun til hvør, ið ger tað. Vit hava als einki ímóti einum orðakifti um blokkin heldur enn um nakran annan politiskan spurning. Men vit halda, at okkara orðaskifti eigur at vera her og ikki uttanlanda. Skal hetta orðaskifti fara fram uttanlanda, so eiga øll sjónarmið at verða løgd fram fyri eitt nú danir.

Hava danskir sakkønir, í hesum føri m.a. nakrir danskir toppolitikkarar sum Marianne Jelved og Frank Jensen, sjónamið uppá blokkin og onnur viðurskifti okkum viðkomandi, so eru tey vælkomin til Føroya at leggja síni sjónarmið fram og at hoyra øll føroysk sjónarmið. Vit hava jú eftirfylgjandi sæð fleiri núanserað sjónarmið um blokkin - sjónarmið, sum bæði Marianne Jelved og Frank Jensen kundu havt stóra gleði av at hoyrt frá einum breiðari forum í Føroyum. Tað skal tí vera áheitan okkara á tey, sum í framtíðini ætla sær at taka slík orðakifti upp, um at gera tað til part av okkara egna gerandisdegi í Føroyum og ikki sum tað sýnist tilætlað at vera brúkt politiskt á einum donskum palli við tí øsing og slagsíðu, sum vit av royndum vita slíkt kann fáa og hevur fingið áður.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vit spara so lítið – men missa so nógv

**Vár Berghamar Jacobsen**
**Bergur Debes Joensen**
**Maud Vang Hansen**

Undan einum vali og í samfelagskjaki annars verður nÓgv tosað um at betra um viðurskifti í samfelagnum. Her hava børnini og tey ungu ein serligan týdning. Góðir skúlar til børnini verður raðfest høgt.

Lat okkum hygga at teimum ungu tónleikaspírunum! Tey eru góðar fyrimyndir. Tey visa vegin fram. Tey hava hegni, tey læra at hava gott arbeiðslag, og gera hvør sítt fyri at náa úrslitum- og stórum felagsmálum sum konsertir, har alneyðugt er við góðum samstarvsevnum.

Tónleikabørnini ríka okkum lívið bæði í heimum, í skúlum, í miðlum, á pallum, í felagshúsum, á ellisheimum, í kirkjum og samkomum, á gøtum, á festivalum og stórum tiltøkum, ja hvar sum helst, og í øllum samfelagsløgum.

Umframt alt hetta hava næmingar úr Musikkskúlunum prógvað at tey eru sera væl fyri og hava vunnið nógvar prísir uttan fyri landaoddarnar. Og eru hervið góð umboð fyri Føroyar.

Best hevði verið um øll børn fingu hendan møguleikan at menna síni tónleikaligu evni, og at fáa eitt gott arbeiðslag frá barnsbeini, sum fer at fylgja teimum gjøgnum alt teirra vaksna lív. Tey læra tíðliga, at tey duga, og harvið fáa tey eina góða sjálvsfatan, og eitt gott støði at byggja eisini annan lærdÓm á.

Hetta mátti verið nóg góð grundgeving fyri at lata skúlan halda fram á tí stigi, hann er á í dag, so heldur enn vaksa um teir longu bíðilistarnar, lat okkum arbeiða fyri at minka um teir. Nú verður arbeitt við at savna inn so nógvar undirskriftir sum gjørligt, fyri harvið at stuðla Musikkskúlanum og føroyskum tónleikalívi.

# Blokkniðurskurðurin svíður hjá musikkskúlanum!

**Johan Petersen**



Í hesum døgum fer fram undirskriftsinnsavnan til frama fyri eykajáttan til musikkskúlaskipanina, so hendan ikki verður skerd. Men orsøkin til ógvusligu skerjingarnar, hóast játtanin í ár er á sama støði ella enntá nakað hægri enn seinasta ár, er niðurskurðurin hjá undanfarna landsstýri av blokkinum við 400 mió. kr.

Syrgiligu útlitini hjá musikkskúlanum við uppsøgnum og niðurskurði í frálærutíðini hjá nógvum musikkskúlalærarum og við tí fylgju, at uml. 200 næmingar færri fara at fáa musikkfrálæru, hevur skelkað foreldur at musikkskúlanæmingum.

**Savna undirskriftir**

Í eini roynd, at fáa broytt útlitini, verða tí undirskriftir savnaðar inn, til tess at gera vart við álvaran.

**Orsøkin blokkniðurskurðurin**

Men samstundis sum hesar royndir verða gjørdar, eigur at verða hugt at, hví vit eru komin í hesa truplu støðu. Jú, samstundis sum undanfarna samgonga hækkar lønirnar og tessvegna veit, at fíggjarkrøvini verða størri, lækkar hon saman við Miðflokkinum blokkstuðulin við 400 mió. kr. og tekur soleiðis grundarlagið vekk undan bæði lønarhækkingum og so nógvum av samfelagsins tænastum.

**200 mió. í halli**

Við 200 mió. í halli á løgtingsfíggjarlógini eru ikki nógvir møguleikar hjá núverandi samgongu at fáa endarnar at røkka saman. Var blokkurin ikki skerdur, hevði fyri tað fyrsta verið javnvág á fíggjarlógini og harafturat 200 mió kr. at gjørt gott við, m.a. eisini til musikkskúlan.

**Ongin atkvøða til flokkar, sum vilja forkoma musikkskúlanum**

Væntandi fer ongin av teimum mongu, sum hava skrivað undir áheitanina um eykajáttan til musikkskúlan, at atkvøða fyri Tjóðveldisflokkinum, Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Miðflokkinum, sum við at skerja blokkstuðulin 400 mió. kr. eru um at hava forkomið tí frálíku musikkskúlaskipan, sum seinastu nógvu árini er bygd upp.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Er Jan Müller blivin klikkaður?

## Blaðstjórin á Sosialinum ger enn eitt fúlt álop á fólkaræðið

**Sjúrður Skaale**



Týsdagin 25. mai skipaði Norðuratlantsbólkurin fyri ráðstevnu á Christiansborg um búskapin í tí sokallaða "ríkisfelagsskapinum".

Eg var við til at skipa fyri ráðstevnuni. Og tað, vit løgdu mestan dentin á, var at fáa eina fjølbroytta skrá, soleiðis at evnið kundi lýsast úr ymsum sjónarhornum.

Tilsamans 12 røðarar vóru. Tað vóru serfrøðingar, fakfólk og politikarar úr Føroyum, Grønlandi og Danmark. Endamálið var at fáa vitan. Einki annað. Eingin røðari var valdur av politiskum orsøkum.

Øll vóru vælkomin. Harumframt fingu t.d. starvsfólk og leiðsla í fíggjarmálaráðnum persónliga innbjóðing við teldubrævi. Men haðani kom tíverri eingin. Hinvegin komu fleiri umboð fyri bæði danskar ráðharrastovur og grønlendska landsstýrið.

Ráðstevnan eydnaðist avbera væl. Framløgurnar vóru áhugaverdar og kjakið livandi.

**Jan loypir á**

Eftir ráðstevnuna hava fleiri fólk, sum ikki vóru til staðar, kritiserað hana við púra vitleysum pástandum, sum allir eru tiknir úr leysari luft.

Nógv av hesum kritikki - t.d. frá fólki sum Virgar Dalsgaard og Rolf Guttesen - er sjálvsagt ikki verdur at gera viðmerkingar til.

Men mikudagin brúkar fremsti pennaførari Javnaðarfloksins, Jan Müller, oddagreinina í floksblaðnum til eitt álop á hesa ráðstevnu, har heldur ikki Jan tók lut.

Jan sigur at: "Tað hevur alt tað, vit vita, verið ein óskrivað meginregla, at føroyskir fólkatingsmenn, staddir í Danmark, eru loyalir móti einumhvørjum sitandi landsstýri."

Til hetta er fyrst at siga, at tað ikki passar. Jóannes Eidesgaard var t.d. ikki loyalur móti landsstýrinum, tá samráðingar vóru um føroyskt fullveldi. Hann var bara loyalur móti Nyrup og danska Javnaðarflokkinum.

Og so má eg spyrja: Hví var tað óloyalt móti sitandi landsstýri at bjóða hesum 12 óheftu fólkunum at tosa um búskap?

Jan sigur eisini at "Tað hevur verið siðvenja, at føroyskir fólkatingsmenn nýta ikki sín fólkatingssess til tess at seta danir upp ímóti politiskum mótstøðumonnum í Føroyum."

Hví heldur Jan tað vera at seta danir upp ímóti politiskum mótstøðumonnum í Føroyum at bjóða hesum 12 fólkunum at halda fyrilestur? Er tað tí hesi 12 fólkini eru óreiðilig og suspekt?

Jan sigur tað vera langt frá at boða frá ósemjum og til at "skipa fyri ráðstevnu við tí endamáli aktivt at máa støðið undan politikkinum hjá eini samgongu."

Var hetta endamálið? Tað kenni eg einki til. Og hví er tað at fáa vitan á borðið tað sama sum at máa støðið undan samgonguni hjá Jan og teimum? Og hvat er tað fyri politisk stevna, sum ikki tolir kjak og vitan?

**Álop á blokkin...**

Jan sigur at "tað er ikki fair at fara aftur um bakið á løgtingsmeiriluta og landsstýri at ávirka danir í einum máli, har sitandi samgonga hevur ein heilt annan og púra greiðan politikk."

Ávirka danir? Aftur um bakið á landsstýrinum? Hvat ólukkan billar Jan sær inn? Tey 12 fólkini bóru ikki fram politiskt bílagdar fyrilestrar.

Jan sigur, at "Andstøðan hevur við álopinum á blokkin niðri í Danmark av álvara lagt sjógv millum seg og samgonguna."

Andstøðan? Var tað nú andstøðan, sum skipaði fyri ráðstevnuni?

Álop á blokkin? Hvat er hetta fyri slutur? Hví er tað eitt álop at biðja fakfólk, serfrøðingar og politikarar siga sína hugsan um eitt mál?

Jan svingar seg eisini upp til at gera hesa djúptøku analysu: "At verða mett sum ein illloyal andstøða er nakað av tí versta, sum kann henda fyri eina andstøðu. Tað er eisini sera ósunt fyri fólkaræðið og álitið millum flokkarnar á tingi."

Er andstøðan í Føroyum nú "illoyal" tí Norðuratlantsbólkurin hevur skipað fyri eini ráðstevnu? Er Jan blivin klikkaður?

Og er tað nú brádliga "ósunt fyri fólkaræði" at 12 fólk leggja fram sína vitan? Hvat er tað fyri slag av fólkaræði, Jan Müller tosar um?

**Fanatikarin Jan Müller**

Jan Müller hevur enn einaferð avdúkað seg sjálvan sum ein blindan, politiskan fanatikara.

Hóast hann ikki var á ráðstevnuni, og hóast hann bara kennir til ein evarska lítlan part av tí, sum varð sagt, spýr Jan bæði gor og gall útyvir fyriskiparar og luttakarar.

Tað, Jan Müller í veruleikanum ger, at loypa á sjálvt talufrælsið.

Hann hevur onga sakliga grundgeving fyri eini einastu av sínum ákærum. Hann finnur seg bara ikki í, at óheftir serfrøðingar og fakfólk hava sagt okkurt, sum ikki passar í hansara og Javnaðarfloksins kramm. Og so skulu tey steðgast! Tey eru ódemokratisk! Tey eru illloyal! Ja, tey eru enntá skaðilig fyri fólkaræðið!

Sannleikin er, at tað, at sjónarmið verða borin fram, er sjálv fortreytin fyri fólkaræðinum.

Tey, sum hótta fólkaræðið, eru tey, sum vilja steðga orðaskiftinum. Tey, sum ikki vilja hava óhefta upplýsing, men politiskt stýrda upplýsing.

Tey, sum hótta fólkaræðið, eru hvørki Norðuratlantsbólkurin ella tey 12 fólkini, sum løgdu fram á ráðstevnuni.

Tey, sum hótta fólkaræðið, eru fanatikarar sum Jan Müller.

# Blokkurin er skaðiligur

**Jógvan Jacobsen**
*landsnevndarlimur Unga Tjóðveldisins*

Árliga danska heildarveitingin hevur nakrar óhugnaligar fylgjur við sær. Fólkaræðið er í vanda, tá sonevndir óheftir fjølmiðlar og landsins stjórn forfylgja politiskum mótstøðufólki fyri at siga sína meining.

At danska heildarveitingin er skaðilig, er lítið at ivast í. T.d. verður prísstøðið kunstiga hildið uppi við teirri avleiðing, at føroyingar verða tað minni kappingarførir.

Men heildarveitingin er eisini skaðilig á aðrar hættir. Forstjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, segði herfyri, at danska heildarveitingin gjørdi kreppuna miklu størri, enn hon annars hevði verið. Jørn Astrup slapp at siga sína meining uttan at verða spiltur niður í sand og øsku afturfyri.

Hermann Oskarsson segði í sama høpi, at danska heildarveitingin ikki verður brúktur til at fremja nakra vælferð í Føroyum. Heldur verður blokkurin brúktur til at gera einstaklingar ríkar við. Men Hermann Oskarsson, ein føroyingur, slapp ikki líka væl sum danin Jørn Astrup Hansen.

So skjótt sum boðskapirnir hjá m.o. teimum báðum komu út um Føroya land fóru fólk at øsa seg upp. Nakað óhugnaligt fór í gongd í Føroya landi.

Ein øðilig útspilling fór í gongd. Føroyska stjórnarsamgongan og tíðindabløðini bæði Dimmalætting og Sosialurin umframt onnur fóru at spilla føroyingin Hermann Oskarsson út fyri at siga sína meining.

Tað løgna er, at danin, Jørn Astrup Hansen, slapp undan allari útspilling, hóast hann beinleiðis segði, at blokkurin er skaðiligur. Føroyingurin, Hermann Oskarsson, bleiv spiltur niður í sand og øsku, bara fyri at siga sína meining á flatlondum.

Av hesum komi eg til eina óhugnaliga niðurstøðu. Blokkurin er skaðiligur fyri fólkaræði og fyri talufrælsið. Dimmalætting og Sosialurin saman við landsins stjórnavaldi hava spilt ein føroying niður í sand og øsku fyri at siga sína meining alment. Men ein dani sleppur at gera sum hann vil.

Hetta er bæði rasistiskt og politisk forfylging. Forfylging av einum persóni, sum verður fataður sum politiskur mótstøðumaður. Og keldan til hesa rasistisku politisku forfylging er, sum vera man, blokkurin.

Alt hetta málið snýr seg um donsku heildarveitingina til Føroya lands. Og henda heildarveitingin hevur skapt eina sterka rørslu ímóti, at fólk, føroyingar, skulu sleppa at siga sína meining alment.

Hvør skuldi trúð, at blokkurin førdi til rasismu og politiska forfylging? Hvar er tað persónliga frælsið nú?

Er hetta prísurin, vit lata, fyri at taka ímóti 615 milliónum krónum um árið? Um so er, so haldi eg, at tað er uppá tíðina, at umhugsa um vit yvirhøvur ynskja hesar pengar.

Meiningin við blokkinum var alla tíðina - sambært sambandsfólki í hvussu so er - at tryggja eitt minstamát av vælferð í Føroya landi. Men nú mugu vit ásanna, at blokkurin onga vælferð tryggjar. Heldur tvørtur ímóti.

# Gevið børnum tónleik – takið góðgæti frá teimum

**Rúna Sivertsen**



Tónleikur mennir børn. Tey børn, ið sleppa at læra at spæla á ljóðføri, læra eisini betur tað bókliga. Børn, ið spæla ljóðføri, verða eisini betur fyri sosialt.

Og trupul børn gerast góð í sær, tá tey sleppa at læra seg at spæla. Hetta er prógvað við royndum, sum eru gjørdar í eitt nú Kanada. Eisini ein stór kanning av 172.000 børnum, gjørd í OECD londunum, vísir hetta sama.

**Sukur darvar**

Børn, ið eta nógv góðgæti og drekka sodavatn, verða illa fyri og læra verri. Olga Hentze, kostráðgevi sigur, at børn, ið eta nógv góðgæti og sukur, gerast rastleys og hava ilt við at konsentrera seg.

Á eini summarlegu í Íslandi hava tey fastar slikkdagar. Starvsfólkini har siga, at børnini eru munandi forstýrisligari tann dagin, tá góðgæti er á skránni.

Ulrike Steuerwald, barnalækni sigur, at vit um fá ár fara at síggja børn við sjúkum, sum fyrr bara sóust hjá eldri fólkum. Orsøkin er góðgæti, sodavatn og alt ov feitur matur.

So tit foreldur! Latið 100 krónur um mánaðin til tónleikaundirvísing til børnini og gevið teimum tað minni at eta góðgæti fyri.

500 børn = 600.000 krónur.

Úrslit: Klókari, glaðari og fRískari børn.

Tey børn, ið ikki fáa 100 krónur, frá mammu ella pápa, ommu ella abba, um mánaðin til góðgæti, eru sjálvsagt ikki við í hesum roknistykki.

ES: Ein sodavatn um dagin = 300 krónur um mánaðin.